


# SKÍÐVIKUSKIFTI TIL VOSS
## – »VESTNORGES ALPER«

Farið á eitt langt vikuskifti til Bergen og takið bilin við. Pakkið viðføri og skíðir og koyrið síðani sjálvi til Voss, har tit kunn renna á skíðum allan leygardagin. Í Bergen búgva tit í íbúð við køki og øllum hentleikum.

Skíðplássið Voss liggur einans 100 km frá Bergen og er eisini kent sum »Vestnorges Alper«, tí bygdin er umgyrd av vøkrum høgum fjallatindum. Skíðstaðið hevur tilsamans 40 km av tilgjørdum skíðbreytum. Har eru 12 skíðliftir, barnaøki og rulliband til tey minstu. Har eru 15 alpinar loypur, 3 svartar, 3 reyðar, 1 blá og 8 grønar. Harumframt er snowboardland og ein halfpipe. Í økinum er eisini skíðútleigan, skíðskúli og 4 matstovur.

**4 NÆTUR FYRI 2 VAKSIN KR. 4.570,-**

Umborð verður gist í kamari uttan vindeyga við 2 undirkoyggjum.

**4 NÆTUR FYRI 2 VAKSIN + 2 BØRN (5-12 ÁR) KR. 5.320,-**

Umborð verður gist í familjukamari uttan vindeyga við 4 koyggjum.

Íroknað kostnaðin: Tórshavn - Bergen fram og aftur við fráferð 06.03, 13.03, 20.03, 27.03, 03.04 og 10.04 í kamari uttan vindeyga við wc/bað + 1 bil (upp til 1,9 m høgur, 5 m langur og 2 m breiður) + 2 nætur í Bergen í Incity Apartments í Deluxe íbúð við 2 seingjarplássum og møguleika fyri 2 uppreiðingum til børn. Deluxe íbúðirnar eru uml. 50m$^2$ og hava 1 kamar við 2 songum, stovu og køk í einum og baðirúm. Køkurin hevur allar hentleikar, so sum uppvaskimaksinu, ovn, mikrobylgjuovn o.a. Avgreiðslugjald, á kr. 60,- fyri hvønn og oljugjald á kr. 25,- fyri hvønn, er íroknað prísin. **Leggið til merkis:** Uppreiðing í íbúðini er bert egnað til børn. Skíðleiga carving-skíðir í 1 dag: NOK 300,- fyri vaksin og NOK 200,- fyri børn og ung. Liftkort í 1 dag: NOK 310,- fyri vaksin og NOK 235,- fyri børn (7-15 ár).

Sí meira kunning á **www.visitvoss.com og www.visitbergen.com**




DANMARK · NOREG
SKOTLAND · ÍSLAND
CRUISE

WWW.SMYRIL-LINE.FO

SMYRIL LINE · J. BRONCKSGØTA 37 · POSTSMOGA 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL +298 34 59 00 · FAX +298 34 59 50 · BOOKING@SMYRIL-LINE.FO